## Stuttligir ella bara keðiligir?

Fyrireikararnir av tiltakinum »Føroya Stuttligasti Politikari« boða nú frá, at tiltakið, sum skuldi verða á Giljanesi 1. september, er avlýst. - Vit, ið hava fyrireikað tiltakið, eru sera hørm um hetta. Eftir at bløðini hava skrivað um tiltakið, plakatir hongdar upp, atgongumerki løgd út á sølustøðini, hava vit fingið skriv frá Bill Justinussen, sum vegna seg , Jørgen Niclasen, Vilhelm Johannesen, Kára P. Højgaard og Torbjørn Jacobsen boðar frá, at teir ikki vilja luttaka. Grundgeving teirra er, at teir ikki vilja kappast um heitið: Føroya stuttligasti politikkari. Vit hava inniliga heitt á teir um at endurmeta støðutakanina, og hava boðað teimum frá, at einki er til hindurs fyri at taka kappingarelementið av skránni, men uttan úrslit. Og av tí, at fráboðan teirra kemur so seint, er vónleyst at broyta konseptið. Tey, ið hava keypt atgongumerki, fáa pengarnar aftur, har hesi eru keypt, siga fyrireikararnir.



*Um teir ikki halda seg vera nóg stuttligar ella óttin fyri komandi løgtingsvali spælir teimum eitt puss, sigur søgan onki um, men bæði Bill Justinussen, Jørgen Niclasen, Kári P. Højgaard, Torbjørn Jacobsen og Vilhelm Johannesen (einasti av hesum, sum ikki stillar uppaftur), hava allir givið avboð til tiltakið »Føroya Stuttligasti Politikari« á Giljanesi 1. september.*

# Bulkskip við tilfari til leitiboring



*Niðurlendska bulkskipið Ritske var á Runavík leygardagin við 1200 tonsum av tilfari, ið skal nýtast til borivirksemið, sum stundar til á føroyska landgrunninum*

*Mynd: Eli Lassen*

**Á Atlantic Supply Base í Runavík gera teir nú klárt til komandi leitiboringina á føroyska landgrunninum, og leygardagin var bulkskip við 1200 tonsum av tilfari**

OLJULEITING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin var niðurlendska bulkskipið Ritske á Runavík við tilfari, sum skal nýtast til komandi borivirksemið hjá BP seinni í heyst ella í vetur.

Skipið hevði tilsamans 1200 tons av sementi, barite og bentonite, ið verða brúkt, tá borað verður.

Níggju av silounum hjá Atlantic Supply Base á havnalagnum hjá Runavíkar havn, eru til turrtilfar og fimm tangar eru til flótandi.

### Gera klárt

- Vit eru nú um at verða klárir á basanum til leitiboringina, sum stundar til. Enn restar tó okkurt í, sum vit skulu fáa upp á pláss.



*Á Atlantic Supply Base í Runavík rigga teir nú til hesa seinastu leitiboringina á føroyska landgrunninum á hesum sinni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Stjórin á Atlantic Supply Base, Eli Lassen, vissar kortini um, at støðin í góðari tíð stendur til reiðar við øllum tí, sum skal til, tá tíðin kemur.

- Nú virksemið á basanum av álvara fer at taka seg uppaftur, er altíð nógv at takast við, serliga í byrjanini. Síðan stabiliserar virksemið seg aftur, tá ið gongd er komin á, sigur stjórin.

Hann vísir á, at tað er ógjørligt at siga, hvussu langa tíð tað fer at taka at bora hetta seinasta holið í hesum umfari, men væntar, at tíðin man fara at liggja um einar tríggjar mánaðir ella stívliga tað.

- Hetta veldst tó alt um, hvussu tað fer at gangast at bora, sigur Eli Lassen.

### Spenningur

Eins og onnur, ið fylgja við gongdini innan oljuleiting um okkara leiðir, er stjórin á Atlantic Supply Base eisini spentur upp á júst hesa leitiboringina, nú Cheveron hevur funnið brunnar í bretskum øki beint hinumegin markið.

Eli Lassen heldur eisini, at geografiska plaseringin hjá Føroyum er sera áhugaverd, nú oljuøkini nærkast okkum sunnaneftir, og stórt virksemið eisini er longur norðuri.

- Hetta gevur okkum nýggjar og bjartar vónir um økt tænastuvirkisemi í oljuvinnuni, sigur stjórin á Atlantic Supply Base.

# Eingin endalig avgerð um Sunbeam

**– Vit arbeiða við ymiskum møguleikum, og vit vænta, at okkurt verður greitt skjótt, men beint í løtuni er eingin endalig avgerð tikin, sigur John Hendrik Holm**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í november í fjør gjørdu trý sjálvstøðug feløg í Vági avtalu við hetlendingar um keyp av trolaranum Sunbeam, men tað tók fýra mánaðir, áðrenn skipið kom til Føroya.

Upprunaliga ætlanin hjá eigarunum var, at skipið skuldi koma í flotan fyri djúpvatnstrolaran Roc Amadour, og sum skilst var einki til hindurs fyri hesum.

Seinni broyttu eigararnir umsóknina til Fiskimálaráðið, tí teir mettu, at fyritreytirnar hjá teimum vóru broyttar. Nú ynsktu eigararnir, at Sunbeam í staðin kemur í flotan fyri djúpvatnstrolaran Sancy.

Men tað vildi Fiskimálaráðið ikki góðtaka, tí útrokningar, sum myndugleikarnir brúka, vístu, at Sunbeam er ov stórur at seta inn fyri Sancy–eisini, hóast maskinan á trolaranum er plombað niður á 1800 HK.

John Hendrik Holm sigur, at Sunbeam framvegis liggur á Vági, og beint í løtuni er endalig avgerð ikki tikin um, hvussu verður.

- Vit arbeiða við ymiskum møguleikum og vænta, at ein endalig avgerð verður tikin heilt skjótt.

Hann sigur, at skipið hevur verið lýst til sølu og eru framvegis á sølulista.

- Vit eru greiðir yvir, at vit fáa ikki Sunbeam inn fyri Sancy. Tann parturin er yvirstaðin. Vit eru ikki argir inn á Fiskimálaráðið, um treytirnar eru, sum tey siga, at tær eru. Hinvegin skulu øll viðgerast eins í skipanini.

Spurdur, um hann ivast í, um feløg ella persónar fáa ymiska viðgerð í politisku og umsitingarligu skipanini, sigur John Hendrik, at tann spurningin hevur hann onga viðmerking til.

Sunbeam, sum framvegis liggur á Vági, er eitt lutfalsliga nýtt skip, smíðaður í 1997.



*Sunbeam liggur framvegis, og enn hava eigararnir, sum eru trý sjálvstøðug feløg í Vági, ikki tikið endaliga avgerð um, hvussu skipið kann fara til fiskiskap*